# Búgv væl í Lalandia

Lalandia bjóðar summarhús til leigu, tá ið ferðin verður løgd til størsta frítíðardepilin í Danmark. Skalt tú rættiliga forkelast, so kanst tú flyta inn í eitt av teimum 106 luksushúsunum, sum eru til leigu.

Samanlagt eru tað fleiri enn 700 summarhús í økinum kring Lalandia frítíðardepilin, og har er pláss til eini 4000 gestir. Tað eru privatfólk, sum eiga summarhúsini, men alt verður leigað og rikið ígjøgnum Lalandia, og har verður stórur dentur lagdur á, at húsini eru góð og reinlig hjá fólki at búgva í.

Summarhúsini eru bygd rundan um allar hinar aktivitetirnar á Lalandia, og tí ber til at ganga ímillum bústaðin og alt annað, sum Lalandia hevur at bjóða.

Summarhúsini eru í ymiskum støddum, og tey eru væl egnað til familjur, sum vilja brúka eina viku ella tvær í Lalandia. Húsini hava allar hentleikar, og økið rundan um er gott og grønt.

107 av summarhúsunum er luksushús, har tú rættiliga kanst forkela teg sjálvan við sauna, spa-baðikari og nógvum øðrum. Upp í átta fólk kunnu búgva í hesum fyrsta floks summarhúsum, sum gera feriuna til eina veruliga dreymaferiu.





















